# VINIR ERU GÓÐIR

© Anders Bøgelund




Tá lambið spælir á bønum og haran hoppar frítt,
Kanska tú sært ... eg haldi tú sært.
Tey eru vinir, tað besta er vinalag.

Tá hundar spæla við kettu, og kettan spælir við seyðin,
kanska tú sært ... eg haldi tú sært,
tey eru vinir, tað besta er vinalag.

Smálomb jarma, hundar goyggja og kiskan sigur mjavv.
Tey tosa jú sítt egna mál og drekka saman vinaskál.

Tá lambið spælir á bønum, og haran hoppar frítt.
Ja, kanska tú sært ... eg haldi tú sært,
tey eru vinir, tað besta er vinalag
Hvat djórini siga, tú hoyrir meg siga.
Tað besta er vinalag.

Tá Lisa spælir við Jógvan, og Jógvan spælir við Per.
Kanska tú sært ... eg haldi tú sært.
Tey eru vinir, tað besta er vinalag.

Betri vinir
Frí for Mobberí

Tá Aron dansar við Heidi, og Heidi dansar við Mark.
Kanska tú sært ... eg haldi tú sært.
Tey eru vinir, tað besta er vinalag.

Ein rættur vinur tað er ein, sum tú kanst líta á,
tú spælir og vilt dansa við, og sum fegin er tær hjá.

Tá ið vinir vilja hjálpa, tey stóru hyggja til smá.
Ja, kanska tú sært ... eg haldi tú sært.
Tey eru vinir, tað besta er vinalag.
Hvat børnini siga, tú hoyrir meg siga.
Tað besta er vinalag.

# Spælið

**Bygnaður:**
[ intro | A | A | B | Aª | solo | intro | A | A | B | Aª ]

**Tilrættalegging:**
Stillið børnini í ein runding.

**SPÆLIÐ**

| | Sangtekstur: | Soleiðis gera tit: |
|---|---|---|
| Intro | | Øll standa hond í hond í einum rundingi. Sveiggjað verður aftur og fram við ørmunum eftir "Ajaja". |
| A | *"Tá lambið spælir …"* | Tey ganga ella dansa eftir lið í rundinginum til aðru síðuna. |
| A | *"Tá hundar spæla …"* | Gangið ella dansið hin vegin. |
| B | *"Smálamb jarma, ..."* | Standið still og sveiggið armarnar aftur og fram móti miðjuni. |
| Aª | *"Tá lambið spælir …"* | Gangið ella dansið í rundinginum eftir lið. |
| Solo | | Farið úr rundinginum og gangið runt og sigið "góðan dag" og takið í hondina á hvør øðrum. |
| Intro A A B Aª | | Upp á sama máta sum nevnt omanfyri. |

**Valmøguleiki:**

★ Halt í einum bandi ella ein hula-ringi - hetta ger tað lættari hjá børnunum, tá tey skulu ganga í ringi. Eisini kunnu tit ganga eftir eini beinari linju, meðan tit halda fast í bandinum.

★ Ger eina forðingarbreyt. Heldur enn at dansa í ringi, skulu tit nú í eini langari røð, gjøgnum hula-ringar, grulva undir stólar, á koddar o.l. Tit skulu framvegis hava armarnar uppi og syngja "Ajaja" í byrjanini av sanginum, síðan røra tit tykkum runt á forðingarbreytini í restini av sanginum.